sosialurin

Abyrgdarblaðstjóri Jan Müller
Fyritøkusstjóri Kristjan Dahl
Ljósmyndari Kalmar Lindenskov

Blaðfólk Randi Jacobsen · Dagny Joensen · Torliev Smith · Hilmar Jan Hansen · Justinus Eidesgaard

Útgevari, uppseting og prent P/f Sosialurin
Bustaður Argjavegi 26 Argjum

Postadr. Postsmoga 76 110 Tórshavn
Telefon 11820
Telefax 14720

Fundurin millum løgmann og Hurd

Oddagrein

NEYVAN nakrantið áður er tað hent, at ein føroyskur løgmaður hevur hitt ein bretskan uttanríkisráðharra á máli. Tí er fundurin í dag millum Edmund Joensen, løgmann og Douglas Hurd, uttanríkisráðharra eisini ein stórhending. Fundurin er komin í lag eftir ynski frá bretum og snýr seg um marknaðsemjuna millum londini.

UTTAN mun til hvat úrslit fer at spyrjast burtur úr fundinum, sum verður í Keypmannahavn, so má tað sigast at vera nærum eindømi, at ein løgmaður møtir á fundi við einum so framstandandi útlendskum politikara. Tað hevur annars ikki verið siður á henda hátt at halda fundir millum løgmann og útlendskar stjórnarleiðarar. Av tí at Danmark umsitur uttanríkismál vegna Føroyar hevur danski uttanríkisráðharrin umboðað okkum. Um nú danskir myndugleikar hava broytt mannagongdina og eru meira hugaðir fyri, at føroyskir politiskir leiðarar kunnu møta framstandandi stjórnarleiðarum í øðrum londum á máli vita vit ikki. Neyvan er tað so, tí ein hevur ikki varhugan av, at tað verður dámt væl í Danmark, at løgmaður og ikki danski uttanríkisráðharrin umboðar Føroyar í aktuellum málum, sum viðvíkja Føroyum. Tað er so bert í sambandi við fiskivinnumál, at hetta hevur verið praktiserað.

HELST er spurningurin um undirgrundarmarkið av slíkum slag, at danir her síggja millum fingrarnar, at løgmaður sleppur at hitta ein so framstandandi politikara. Kanska teir hugsa, at tað eisini tænir donskum áhuga málum, at ein føroyskur løgmaður fer á fund við bretar um hetta málið. Tí hóast undirgrundin er yvirtikin av føroyingum, so er spurningurin um markið rundan um Føroyar ein ríkisfelagsspurningur, sum í síðsta enda danska stjórnin og fólkatingið hava ábyrgdina av. Tvs. at meðan føroyingar hava avgerðarrættin til møguligt ríkidømi í undirgrundini, so hava danir endaliga avgerðarrættin, tá tað snýr seg um ásetan av undirgrundarmarkinum.

NEYVAN eiga vit at seta ov nógvar vónir til fundin millum løgmann og Hurd. Men vit eiga heldur ikki at undirmeta hann. Tað kann væl vera, at løgmaður fær greitt Hurd frá støðu føroyinga í hesum máli á ein so skilagóðan hátt, at bretski ráðharrin fer heimaftur til London við eini eitt sindur øðrvísi støðutakan enn undan fundinum við løgmann. Hetta kann ljóða naivt. Men vit eiga tó at hava álit á løgmanni, at hann ger sítt ítarsta at greiða bretum frá hesum fyri Føroyar livstýðandi máli. Nú bretsk bløð eru farin at gera nógv burtur úr málinum og vísa á, at her er talan um eina stóra tjóð, sum traðkar á eina minni, so kann tað eisini telja tann rætta vegin.

Sosialurin

Er tað ikki vandamikið , so leingi einki er ístaðin, at krevja:

RUSSISKAR TILSTANDIR

Uttan sjálvur at taka dagar millum hvat eigur at verða gjørt, ella hvat betur var ógjørt, so verður her gjørd ein roynd til tess at meta um hvussu rætt tað nú var so einmælt at krevja eina dómarakanning. Hugleiðingin byggir á eitt úttalilsi hjá Erik Hoffmeyer í SAMVIRKE , ið varð endurprentað í SOSIALINUM stutt síðan. Tað er ikki tilætlað ,um greinin gevur fatan av, at tann , ið skrivað hevur er talsmaður fyri teirri einu heldur enn hini av teim báðum nevndu ideologiunum , ið verða umtalaðar. Um so er kortini, er talan um vantandi evni at skriva. Eitt er kortini av týdningi, og tað er sjónarmiðið um ikki at taka eina skipan av fyrr enn man hevur eina frægari at seta í staðin.

TVÆR IDEOLOGIIR

Í grein, sum fyri stuttum stóð í Sosialinum skrivar Erik Hoffmeyer fyrrv. tjóðbankastjóri soleiðis, um tær tvær ideologiirnar/búskaparskipaninar, ið hava verið galdandi í okkara tíð: "Frá einum ideellum sjónarmiði kann ikki vera sagt at eitt dirigerað system, ætlanarbúskapur, er verri enn tann núráðandi marknaðarskipanin, ella Kapitalisman."

SJÓNLIGIR NEGATIVIR EGINLEIKAR

Og um Ætlanarbúskapin í praksis sigur hann: *"Men tað vísti seg at negativu menniskjaligu eginleikarnir egoisma, intolerance, persónligur dominansur* ***gjørdust alt ov sjónligir!"*** (kursiveringin mín ábyrgd) Hann sigur ikki at hann heldur, at tað er gjørligt at eliminera hesar so sera eyðkent menninskjansligu eginleikarnir, men hann vísir á, at hesir negativu eginleikarnar gjørdist ***"alt ov sjónligir"!*** Brúkarin av t.d. tí sovjetiska systeminum gjørdist førur fyri at síggja tað støði til etik og moral, ið var galdandi fyri teir, ið sótu á búskaparliga valdinum og demoraliseringin breiddi seg út til brúkaran og øll skipanin skramblaði saman. Eitt heimsveldi datt sundur tí tað toldi ikki dagsins ljós!

HAZARD

Vesturheimska marknaðarskipanin, man hon ikki fara sama veg um hon verður visualiserað? Er tað ikki hazard, hettar sum Føroya løgting hevur lagt upp til? Kapitalisman tolir líka lítið sum kommunisman at gerast sjónlig, skilt á tann hátt at heldur *ikki danska, búskaparskipanin, ella fyri tann skuld nøkur onnur skipan, tolir at vera drigin fram í dagsins ljós, og tað er tvalevst eisini orsøkin til at okkara peningaheimar er vardur móti innlíti av okkara løgum!* Tann sovjettiska skipanin , ið ikki var vard í sama mun skramblaði saman av tí sama. Hon kom í andsøgn til vanligu fatanina hjá fólki um etik og moral. Hoffmeyer skal kanska skiljast soleiðis: Vóru hesi viðurskifti hjá teim leiðandi ikki vorðin sjónlig, so hevði skipanin ikki komið í tílíka andstøðu. Hon hevði kanska virkað! Hann heldur fram: "Marknaðarskipanin er so avgjørt ikki nøkur idealstøða, men hon kann sigast at vera meira effektiv!" Fyri egnu rokning vil eg leggja afturat: *"Tí at hon virkar meira anonymt!"* Erik Hoffmeyer er ikki nakar hvør sum helst. Hann hevur eitt heilt langt lív stýrt tíðandi partum av donskum búskapi, og hetta hevur hann gjørt við hepnari hond. Tað er tí vert at leggja sær í geyma hvat tað er, ið Hoffmeyer sigur: ***Tann negativi menniskjaligi faktorurin var ov sjónligur! (Hetta sigur hann í sambandi við at skipanini í Sovjet skramlaði saman.)***

DULD ÓSJÓNLIG ER OKKARA VERÐ

Nú hava vit seinastu tíðina, í sambandi við tjakið um dómarakanning ella ikki, her í Føroyum og Danmark við, fingið staðfest at kapitalistiska skipanin er ein sera sera ósjónlig, vard og duld skipan: Meðan staturin kanska hevði ov stórt innlit (og av tí sama stóra ávirkan) á búskapin í sovjettiska systeminum, so hevur eingin atgongd til nakað sum helst í okkara skipan, ikki staturin (landstýri), hvaðna minni almenningurin.

UMHVØRVISFÓLKI OG VIT

Nøkur umhvørvisfólk eta svína- og oksakjøt men fortreingja myndina av tí blóði, ið streymar í kloakkirnar á enormu sláturhúsunum, har sokallaða "skitna" arbeiði fer fram. Eru tað tílík fólk, ið standa aftan fyri einmælta kravið um at taka kapitalistisku skipanina av við dómsvaldið?

RUSSKIR TILSTANDIR

Mín spurningur er hesin: "Vil kapitalistiska skipanin, eins og tann kommunistiska, ikki eisini skrambla saman, um tað við dómarakanningum eydnast at visualisera menniskjansligu eginleikarnar hjá teim menniskjum, ið stýra einari markanaðarbúskaparskipan?"

ER NAKAR MUNUR?

Er tað logiska svarið ikki, at tað ikki kann verað nakar grundleggjandi munur í muruni mennuskjum ímillum, á teimum ið stýra einari peningaverð her ella har, óansæð hvat hon eitur? Er ikki einasta "mátturin" nettup "graðurin" av anonymiteti (ið fjalir yvir tær tíðun neyðturvuligu ómenniskjansligu avgerðirnar, ið takast megu), ið er avgerandi fyri hvør situr eftir á tí vinnandi skipanini? Er sýtanin av hesi dómarakanning ikki grundað á vitanina um, at øll skipanin skramblar saman, um tað kemur fyri ein dag, at Kapitalistiska skipanin eins og tann Kommunistiska fjalir út yvir precis teir somu ikki acceptablu negativu menniskjansligu egnaleikarnar, ið hin skipanin fall uppá?

SPURNINGURIN

Er tað ikki hettar, ið ger, at danski staturin nú tvíheldur um nettup tann anonymitetin? Tí at anonymiteturin er sjálv fortreytin fyri teirri kapitalistisku skipanini (eins og hann átti at verið tað fyri tann kommunistiska, ið doyði tá tann menninskjansligi faktorurin gjørdist opinberligur) Og sum eina konsekvens av hesum, kann so ikki, av røttum, spyrjast um tað eru russiskir tilstandir okkara politikkarar (ið hava tikið við ábyrgd) nú ynskja settar í verk í okkara heimsparti?

VIT- IKKI TIT- VITA ALT

Og er hetta ikki eisini hent tí at menn og kvinnur ábyrgdarleyst einvíst hava hildi seg eiga allan heimsins førleika tá tey so einvíst tykjast at hava tveitt burtur allar tær royndir , ið teir royndu politikkararnir hava gjørt? Ikki at hava ráðført seg við Birgir Danielsen, Olaf Olsen, Atla Dam og fleiri aðrar er eitt óluksáligt spill av resoursum, eingin sigur heldur at tað er muran, góð ella ring, ið skuldi verið fylgd, men eitt løgting, ið ikki ger nýtslu av teim royndunum, sum eru gjørdar og sum tað er goldið fyri, eitt tílíkt løgting ger einki til lítar. Livst so spyrst!

j.smith.